# Reglugerð

**um endurgjald fyri stuðlamúr og garð móti kommunalum vegi, har kommunan ikki hevur gjørt arbeiðið liðugt.**

**Tað er tekniska nevnd sama við fíggjarnevnd kommununnar, sum umsitur hesa reglugerð.**

Tá ***kommunalur vegur er hægri enn lendið***, eitt nú tá sethús standa niðan fyri veg og fráleiki til sethús er soleiðis, at neyðugt verður at gera stuðlamúr móti vegnum, fyri at t.d. túnið rundan um húsini kann gerast liðugt, kann arbeiðið at gera kant ella stuðlamúr verða framskundað á tann hátt, at ánari av eini ogn, sum lýkur krøvini, sjálvur kann gera arbeiðið.

Viðkomandi kann eftir *skrivliga umsókn* verða veitt endurgjald svarandi til í mesta lagi kr. 2.000,- pr. m³ fyri betong + møguliga armering, sum er neyðugt til ein stuðlamúr upp til 0,60 metur hædd. Endurgjald verður ikki veitt fyri arbeiðsløn.

Tá ***kommunalur vegur er lægri enn lendið***, tá hús standa oman fyri veg, ella at vegur ella gongubreyt er við síðuna av húsum, eitt nú í útstykkingum, og ánarin av ognini ger garð móti vegnum, kann eftir *skrivliga umsókn* verða veitt endurgjald svarandi til í mesta lagi kr. 2.000,- fyri m³ av betongi + møguliga armering, sum er neyðugt til ein stuðlamúr upp til 0,60 metur hædd. Endurgjald verður ikki veitt fyri arbeiðsløn.

Dimensjónir og hæddir skulu verða góðkendar av teknisku nevnd.

Tekniska nevnd skal fáa til vega upplýsingar um kostnaðin av byggingini, og skal ein niðurstøða við tilmæli til fíggjarnevndina verða gjørd, áðrenn peningurin fyri tilfar verður útgoldin.

Goldið verður bert fyri gjørt og góðkent arbeiði, endurgjald verður bert latið ta einu ferðina.

Møgulig ivamál um tulking av hesi reglugerð verða at leggja fyri kommunustýrið til avgerðar.

Endurgjald í málum sambært reglugerðini kann bara verða játtað eftir skrivligari umsókn, og skal avgerð verða tikin um endurgjald í hvørjum einstøkum føri, áðrenn nakað arbeiði verður sett í verk.

Í sambandi við fyrireiking av útstykkingum, planlegging av nýggjum vegum ella fyrireiking av umvæling ella broyting av verandi vegum og líknandi. skal tekniska nevnd, umvegis fíggjarnevndina, koma við einari meting til kommunustýrið av tí kostnaði, ið henda reglugerð kann koma at hava við sær, um øll, ið kunnu koma undir reglugerðina, søkja og fáa endurgjald sambært reglugerðini.

Henda reglugerð kemur í gildi tann 1. oktobur 2010.

**Vága kommuna**

## Mannagongdir í samband við umsókn:

- Umsøkjarin sendir umsókn við tekningum av garðinum og tvørskurði.
- Tekniska nevnd góðkennir umsókn og tekningar.
- Garðurin verður gjørdur.
- Rokning verður send kommununi fyri tilfar.
- Verkfrøðingur roknar nøgdirnar og góðkennir rokning.
- Rokningin verður goldin sambært nøgdarrokning frá verkfrøðingi.




Generellur tvørskurður móti granna undir vega - niveau.

M = 1:100




Generellur tvørskurður móti granna yvir vega - niveau.

M = 1:100




Generellur tvørskurður móti granna á P-plass - niveau.

M = 1:100

Vága Kommuna
Generellir tvørskurðar
M=1:100
Miðvágur tann 25.08.2010
K.E.